Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



Jóannes Dalsgarð, Húsalánsgrunnurin:

# Leitt stovnin við nærlagni og eldhuga

**Hósdagin 11. november 2004 var hátíðarhald hjá Húsalánsgrunninum Yviri við Strond í Havn í samband við at stjórin, Jóannes Dalsgarð, fylti 65 ár og hevur arbeitt 40 ár á stovninum**

MÓTTØKA

*Myndir: Magnus Gunnarsson*

Starvsfólkini hjá Húsalánsgrunninum hátíðarhildu hósdagin 11. november, at stjórin, Jóannes Dalsgarð, fylti 65 ár. Eisini eru liðin 40 ár síðan hann byrjaði á stovninum, og 25 ár síðan hann varð settur sum stjóri.

Møtt vóru familja, vinir og kenniningar umframt fyrrverandi og núverandi stýrislimir. Eisini var Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í íbúðarmálum, við til móttøkuna.

Hjá Jóannesi byrjaði starvsleiðin við, at hann kom í starv á skrivstovuni hjá, Hanusi við Høgadalsá, í 1963. Hanus hevði reiðaravirksemi, umframt at hann var bæði løgtingslimur og býráðlimur í Havn. Skrivstovan var í Føroya Banka bygninginum í Niels Finsensgøtu.

Í juni 1964 varð so Húsalánsgrunnurin settur á stovn. Í fyrstu nevnini sótu Heini á Trøðni, J. H. Danbjørg, og Hanus við Høgadalsá, ið varð settur sum dagligur leiðari í grunninum.

Jóannes var fyrstu árini skrivstovufólk og seinni settur sum bókhaldari á Húsalánsgrunninum. Tá ið grunnurin bleiv umskipaður í 1978 varð bygnaðurin broyttir frá at verða ein nevnd við dagligum leiðara, til stýri og stjórn. Landsstýrið setti Jóannes sum stjóra í 1979.

Húsalánsgrunnurin var stovnaður við tí endamáli at skapa betri fíggjarligar treytir hjá fólki at seta búgv, við tað at tað almenna gjøgnum grunnin átók sær partar av bústaðarfíggingini.

Hans Pauli Strøm segði m.a., at tað er ikki hvørjum manni beskorið, at hava virkað heili 40 ár á sama arbeiðsplássi. Okkara tíð er merkt av ótolni og skjótum broytingum, og tí eru tey ikki longur so nógv í tali, sum finna sær eitt lívsstarv, eins og Jóannes hevur gjørt. Hetta er eitt tekin um menniskjaligar eginleikar sum trúfesti og nærlagni, ið eitt samfelag sum okkara, ongantíð kann fáa ov mikið av.

Bæði áðrenn og eisini nú síðan eg gjørdist landsstýrismaður, og m.a. fekk ábyrgd fyri bústaðarøkinum, havi eg lagt til merkis tann eldhuga sum Jóannes altíð sýnir tí stovni og arbeiðsøki, sum hann varðar av. Eg vóni at hetta eisini kemur at gagna arbeiðinum við teimum avbjóðingum, sum nú liggja fyri framman.



*Starvsfólkini á Húsalánsgrunninum. Aftast f.v.: Martin Petersen, Annfinn Vang, Egin Midjord, Rúna F. Holm, Páll Poulsen, og Egil Helmsdal. Miðraðið, f.v. Sunneva Jacobsen, Hervør Heinesen, og Jóannes Dalsgarð. Fremra rað, f.v.: Malan Guttesen, Elin H. Joensen, og Katrin Nolsøe. Edmund Kristianen vantar á myndini*



*Jóannes og mamman, Dinna, hon er 88 ára gomul og var við til móttøkuna*



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, heilsar Jóannesi Dalsgarð á 65 ára føðingardegnum*



*Stýrisformaðurin í Húsalánsgrunninum, Marja Lamhauge, handar Jóannesi ein málning av Finleif Mortensen, listamanni, í føðingardagsgávu*



*Jóannes saman við tveimum fyrrverandi starvsfeløgum. Óluva Petersen, sum arbeiddi á Húsalánsgrunninum frá 1980-2004, og Eydna Viderø, sum arbeiddi frá 1974-2002*



*Benny Samuelsen, fyrrverandi stýrislimur í Húsalánsgrunninum, var við til móttøkuna*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Minningarorð um elskaðu mammu okkara
# Magnhild á Toftini

Vit vilja við nøkrum fátøkum orðum skriva eina seinastu heilsan til mammu okkara, sum eftir okkara tykki varð tikin alt ov tíðliga frá okkum. Sjúkan gjørdist so hervilig til endans, at mamma ikki orkaði at standa ímótí meira.

Mamma var borin í heim í Fuglafirði tann 13. oktober í 1929. Foreldrini vóru Jacobina og Sámal Jacob í Lambanum. Tey fingu 10 børn - 5 dreingir og 5 gentur. Mamma var tann 7 í røðini í hesum barnaflokki. At tað má hava verið trongligt til tíðir í hesum lítla húsið man eingin ivi verða um, men ongantíð hoyrdu vit hana gremja seg um tað - tvørturímóti. Hon plagdi at taka til, hvussu ómetaliga góð foreldur hennara vóru og hvussu góð tey vóru við hvønn annan og hjálptu hvør øðrum.

Vit minnast eisini hvussu hugnaligt tað altíð var at vitja ommu og abba í Fuglafirði. Í dag eru bert 2 sysktin hjá mammu á lívi, nevniliga Alfred mammubeiggi sum býr í Havn og Amy mostur sum býr í Fuglafirði - skamt omanfyri har sum barnaheimið hjá teimum stóð.

Tað veruliga arbeiðslívið hjá mammu byrjaði við, at hon longu sum 14-ára gomul fór til Klaksvíkar at tæna hjá Alexandru og Kaj Johannesen.

Nøkur ár seinni arbeiddi mamma í Gøtu, heima hjá systir síni Beatu, sum var gift við Elias hjá Benadikt. Pápi okkara var um hetta mundi í læru sum húsasmiðjur í Fuglafirði, og var tað tá tey møttust fyrstu ferð.

Mamma og pápi giftust í 1949, og fingu tey saman 6 børn. Hesi eru Ólavur, Sámal, Anna, Sólbjørn, Terji og Jan. Tey bygdu sær hús í Syðrugøtu í 1958, so her vuksu vit øll børnini upp í tryggum korum. Tá ein fær 6 børn at taka sær av, verður altíð nokk at gera í heiminum - og hesa uppgávu røkti mamma so væl og virðiliga. Tá so ommubørnini komu, var altíð pláss til tey afturat í heiminum í Syðrugøtu.

Eftir at børnini vóru tilkomin fór mamma aftur at arbeiða - fyrst við sild í Norðagøtu, síðani sum vaskikona í skúlanum og sum heimahjálpari. Tey seinastu árini, áðrenn hon fór frá vegna sjúku, arbeiddi hon á umlættingarheiminum í Syðrugøtu. Mamma var tiltikin fyri altíð at verða nærløgd og álítandi í sínum arbeiði.

Vit høvdu vænta, at tað fór at verða lætt at skriva nøkur orð um okkara elskaðu mammu, men tað er torført at fáa allar tankar at rúmast í høvur okkara tá vit lata hugin reika inn í barnaheimið aftur. Tað er sera torført at fella á blað allar teir tankar og tey minnir vit hava, tí alla tíðina kemur kæra andlit hennara fram og ein steðgar heilt upp. Vit síggja fyri okkum hennara blíða, eyma og altíð kærleiksfulla lyndi - hvussu hon altíð var har fyri okkum systkin, hvussu væl hon dugdi at troysta okkum tá vit høvdu brúk fyri tí, og hvussu væl hon livdi seg inn í okkara kenslur um vit høvdu sorg ella vit kendu til onkran sakn.

Og ikki at gloyma, tá ið vit gleddust - hvussu hon tá gleddist saman við okkum.

Eitt, sum eyðkendi mammu, var hvussu hon altíð var til reiðar at hjálpa øðrum. Vit hava mangan undrast yvir, at sjálvt um hon hevði ovmikið at takast við sjálv, var hon altíð til reiðar við einari hjálpandi hond - eisini eftir at heilsan fór at bila.

Eitt annað, sum sermerkti mammu alt lívið var hennara óvikandi trúgv á Harran, og takksemi hennara til tann Gud, sum hon setti sítt álit á longu sum ung genta. Henda avgerð kom til at hava so stóran týdning fyri hana, og ikki minst fyri okkum systkin og pápa okkara. Tað lá henni altíð tungt á hjarta at vinna onnur



fyri Harran - ikki bert síni nærmastu, men øll tey sum hon var saman við. Til dømis kann nevnast, at hon trúliga leiddi okkum børn í sunnudagsskúla nærum hvønn sunnudag. Hetta lýsti út av henni í tí dagliga og við tí fyrimyndarliga atburði, sum hon vísti yvir fyri øllum. Og ein dag skulu vit møtast aftur fyri ongantíð at skiljast meira.

Takk góða mamma fyri, at tú lærdi okkum at elska Jesus og leiddi okkum til hansara

Longu í 1990 byrjaði heilsan av álvara at bila, og tískil bleiv mamma send til stóra skurðviðgerð í Danmark. Eftir øllum at døma var henda viðgerð ikki so væl eydna sum vit vónaðu, og kom hetta at fylgja henni restina av lívinum. Tó hoyrdi tú hana ongantíð gremja seg um seg sjálva. Vit sum dagliga sóu hana, løgdu til merkis, hvussu mangan hon píndist innaní, og hvussu hon av øllum alvi royndi at halda tað fyri seg sjálva.

Mamma hevði sera góð evnir, tá tað kemur til yrkingar bæði í gaman og álvara.Hetta sæst eisini á hesum sangi, sum hon yrkti meðan hon var til viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum, og sum næstelsti sonurin Sámal ein dag fann inni í bíbliuni hjá mammu:

*Á Jesus eg elski teg, tú kærur ert mær*
*Ei aðra staðni finni eg, tað hvíld sum hjá tær*
*Í viðrák og mótrák - eg leiti til tín*
*Mín elskaði frelsari, eg veit tú ert mín*

*Tú fyri meg bløddi á Golgata træ*
*Og eisini har fyri syndarum bað*
*Ja, sligin og særdur í deyðan tú gekk*
*Eg takka tær Jesus vil fyri títt verk*

*Hoyr syndari kæri, kom vend tær til hann*
*Tí júst fyri teg var tað blóðið hans rann*
*Drála ei longur, men kom nú í dag*
*Um tú ætlar við til hin himmalska stað*

**Magnhild á Toftini**
**Á Ríkissjúkrahúsinum 09.10.1991**

Heimaftur komin til Føroya var mamma sjálvandi veik, men royndi sum altíð at fáa sum frægast burturúr.

Ì 1994 bleiv felagið Gøtubrá, sum er eitt tilhald fyri pensionistarnar í Gøtu kommunu, stovna. At verða aktiv og sjálvboðin arbeiðskraft fyri at betra um umstøðurnar hjá hesum samfelagsbólki lá henni nær hjartanum. Hon var ein av teimum, sum strongdu á at fáa bygt eitt eldrasambýli í bygdini - og í dag sæst, at hetta arbeiði hevur borið frukt. Eitt snotuligt hús stendur í dag liðugt bygt í Norðagøtu.

Eisini var mamma við í arbeiðinum tá tað snúði seg um tey veiku í samfelagnum. Í nógv ár var mamma nevndarlimur í Javna, bæði í sjálvari nevndini í landsfelagnum og í økisnevndini fyri Eysturoynna. Her lá tað eisini henni nær, at tað skuldi henda okkurt fyri tey menningartarnaðu í Føroyum.

At eiga nógv børn má verða ein tann besta gávan tú fært her í lívinum, men at missa børn er harafturímóti nakað av tí ringasta eitt menniskja kann uppliva.

Í 1995 mistu mamma og pápi elsta sonin Ólav, bert 44-ára gamlan. Hetta kom sum ein ógvuliga dyggur smeitur fyri okkum øll, men við at leggja alla sína sorg framman fyri Harranum styrkist ein aftur í gerandisdegnum.

Í 1999 rakti sorgin aftur, tá yngsti sonurin Jan doyði. Lítlibeiggin, sum altíð hevði búð heima hjá mammu og pápa - og gjørdi hetta líka til tað síðsta. Jan bleiv bert 33 ára gamal. At missa tveir synir virkar so órímuligt og tyngjandi, at ein ikki fatar hví hetta júst skal henda fyri ein sjálvan. Mamma og pápi hava liva saman í sorgini eftir alt tað sum er hent teimum, og hevur hetta styrkt tey saman.

Fyri fáum árum síðani byrjaði fjørðurin hjá mammu av álvara at smalka. Enn ein hervilig sjúka fekk fastatøkur á hennara frammanundan veika likam. Eisini her vísti hon eina ófatuliga stóra styrki. Ikki vildi hon siga okkum, at tíðin nokk ikki fór at verða long til hon fór at flyta heim til Harran. Hon visti sjálv hvønn veg tað bar, men ongantíð segði hon okkum frá hesum. At skána onnur menniskju var hennara sermerki.

Tann 18-02-2004 orkaði likam hennara ikki meira, og mamma flutti heim til Harran, 74-ára gomul. Vit vóru glað fyri saman við pápa okkara at kunna sita við sjúkrasong hennara líka til síðsta andadrátt.

Tankar okkara eru eisini hjá tær góði pápi, og vit ynskja at takka tær fyri tað sum tú hevur verið og enn ert fyri okkum systkin. Takk fyri, at tú eisini megnaði at gera mammu lívskvøldið so gott. Tú vart um mammu okkara bæði dag og nátt - heima sum á sjúkralegu, og tað eru vit ógvuliga takksom fyri.

Harrin signi teg, og styrki teg framyvir.

Friður verði um minni um mammu okkara.

**Børnini.**

## Dagurin

**13. november. Arcadius**, deyður ár 437. Aðalborin maður, sum var í fylginum hjá vandalakonginum Geiserik. Tá ið tað kom upp, at hann var kristin, varð hann tikin av døgum.

**14. november. Fríðrikur**. Hildið verður, at her verður sipað til ein biskup í Utrecht, sum varð myrdur av leigudrápsmonnum í 838. Keisarinnan Judita hevði sent teir, av tí at Fríðrikur hevði roynt at fáa keisaran til at skiljast frá henni.

Navnið er tað upprunaliga gotiska Fripareikes, og merkir *friður* og *harri*.

*Johan Henrik Schrøter doyði hendan dagin í 1851.*

**15. november. Leopold**, deyður í 1136. Greivi í Eysturríki, sum varð skírdur halgimenni fyri mongu góðgerðir sínar og fyri tær kirkjur og kleystur hann læt byggja. Hann umkomst á eini veiðuferð.

Navnið kemur av týska orðinum fyri *fólk* og *djarvur.*